DAGSINS MEINING

Fólkaræ›i og politiska uppl‡singin

At ta› kostar pengar at fáast vi› politikk, løgdu tingmenn, vi› tingformanninum á odda, serligan dent á í fjør, tá teir hækka›u tingmannalønina úr umlei› 16.000 krónum upp í umlei› 25.000 krónur. Á hesum sta› skulu vit ikki taka dagar ímillum, um hetta var rætt ella ikki.

Men nú fíggjarlógaruppskoti› er lagt fyri tingi› sæst, at landsst‡risma›urin í mentamálum hevur skarva› av játtanini til politiska uppl‡sing, sum er stu›ul til politisku flokkarnar.

Í sínari tí› var› hesin stu›ul n‡ttur m. a. til bla›útgávu, men seinnu árini hava flestu flokkar bygt upp eina organisatión, sum kostar nógvar pengar at reka.

Vit kunnu altí› kjakast um, hvørt ta› er rætt, at flokkarnir fáa almennar pengar til rakstur. Men ta› skerst ikki burt, at fólkaræ›i› ver›ur styrkt, um allir flokkarnir eru javnt væl fyri fíggjarliga.

Í ø›rum londum ver›a flokkarnir ø›rvísi fíggja›ir. Í Danmark eru Javna›arflokkurin og fakfelagsrørslan rættuliga tætt kn‡tt, og ver›ur flokkurin stu›la›ur fíggjarliga av fakfeløgunum. Teir borgarligu flokkarnir ver›a á sama hátt stu›la›ir av vinnulívinum, men kortini hevur Fólkatingi› økt munandi um fíggjarliga stu›ulin til flokkarnar.

Í Føroyum kenna vit einki til, at hvørki fakfelagsrørsla ella vinnulív stu›la flokkum fíggjarliga, og er ta› helst tryggast, at hesum stu›ul greitt er tilskila›ur á løgtingsfíggjarlógini. Ta› tykist kortini, sum um ávísir politikarar síggja eina fragd í pilka burtur av hesi játtan - og ofta hevur ta› bara veri› fyri at sæ›penur út.

Í vi›merkingunum til fíggjarlógaruppskoti› nertir mentanarnevndin hjá løgtinginum vi› júst hetta máli›. Mælt ver›ur til, at kontoin á fíggjarlógini ver›ur flutt frá grein 7 undir skúlamálum, sum er »útbúgving og gransking« til grein 1, sum eitur »Løgtingi›« og ta› er løgtingi›, sum eigur at gera greitt, hvussu politisku flokkarnir skulu stu›last.

Ey›sæ› er, at hetta hevur rættuliga nógv vi› fólkaræ›i at gera. Ta› er av sera stórum t‡dningini, at andstø›uflokkarnir eisini hava møguleika at ver›a vi› í politisku prosessini. Hetta er kanska serliga komi› til sjóndar í hesum valskei›i, tá landsst‡ri› hevur gjørt sera nógv uppl‡sandi arbei›i, har spurningurin kann setast vi›, um ta› er partapolitiskt ella ikki. Solei›is fer altí› at vera, tí flokkarnir í samgonguni ver›a altí› betri fyri í so máta.

Men vi› at tryggja fíggjarliga grundarlagi› undir flokkunum, ver›ur samstundis tryggja›, at andstø›an hevur møguleikan at koma vi› einum konstruktivum mótspæli. Hava andstø›uflokkarnir ikki fíggjarligu fortreytirnar fyri at gera hetta arbei›i, so ver›ur úrsliti› hareftir.

NØVN Í VIKUNI

Lisbet stillar ikki upp - 1007 leysar atkvø›ur

Lisbeth L. Petersen, sum er 61 ár, fyrrverandi borgarstjóri í Havn og løgtingsumbo› Sambandsfloksins, er ikki millum valevnini hjá Sambandsflokkinum til b‡rá›svali› hesafer›.

Lisbeth var› vald í b‡rá›i› í 1984, tá Petur F. Christiansen ikki stilla›i uppaftur. Hon var› vald sum einasta sambandsumbo›.

Hon var saman vi› Fólkaflokkinum í samgongu, tá Poul Michelsen var borgarstjóri. Lisbeth gjørdi seg serliga galdandi sum forkvinna í sosialu nevnd tá.

Í 1988 vaks Sambandsflokkurin vi› einum b‡rá›slimi, tá He›in Mortensen eisini var› valdur á Sambandslistanum.

Í 1992 fekk Lisbeth yvir 700 atkvø›ur og gjørdist borgarstjóri. Tá vaks flokkurin vi› enn einum umbo›i, tá Schuman Hjaltalin eisini var› valdur á Sambandslistanum.

Sum stóri atkvø›uslúkarin vi› sí›sta val vi› 1007 atkvø›um - tá flokkurin vaks vi› enn einum, tá Kaj Leo Johannesen eisini var› valdr, var› hildi›, at hon fór at halda fram sum borgarstjóri. Men tá kundi sigast, at hon »svav í tímanum«, tí tá hon vakna›i morgunin eftir, hev›i Fólkaflokkurin bo›i› Leivi Hansen borgarstjórasessin og harvi› Tjó›veldis- og Javna›arflokkinum samstarv.

Í tí›ini hjá Lisbeth Petersen í b‡rá›num ferfalda›ist sambandsumbo›anin - men flokkurin noyddist í andstø›u.

Katrin Dahl úr b‡rá›num

Katrin Dahl, sum í fleiri skei› hevur siti› í b‡rá›num í Havn fyri Fólkaflokkin, stillar ikki uppaftur á hesum sinni. Ongin ivi er um, at tí›indamenn fara at sakna Katrin í b‡rá›num, tí hon hevur altí› luttiki› virkin í or›askiftinum á b‡rá›sfundi og hon hevur mangan givi› yvirskriftir. Katrin er ein bestemt dama og mangan or›adystin hevur hon havt vi› mótstø›umenn á almennum b‡rá›sfundum

Katrin er fólkaflokskvinna burturav, og hon verjir gar›, tá ta› sn‡r seg um, at ta› almenna fær ov stóran leiklut í lívinum hjá fólki. Katrin er sjúkrasystir, og hon hevur í mong ár starvast á hvíldarheiminum Naina í Havn.



Páll Vang ikki á listanum

B‡rá›sforma›urin á Tvøroyri stillar ikki upp aftur til b‡rá›svali›. Páll gjørdist álvarsliga sjúkur á jólum, og ta› er av heilsuávum, at hann ikki stillar upp aftur.

Páll Vang hevur fyri Fólkaflokkin veri› vi› til at mynda kommunupolitikkin á Tvøroyri seinastu sekstan árini og seinastu átta árini hevur hann siti› vi› ró›ri› sum b‡rá›sforma›ur.

Páll Vang er ma›urin vi› teim stóru visiónunum, og hann hevur veri› í›in seinnu árini at fáa Tvøroyri upp í eina komandi oljuvinnu sum supplyhavn. Hann hevur eisini veri› virkin í tunga strevinum, at finna eina loysn á truplu kommunuskuldini í landinum. Páll Vang sat sum landsst‡risma›ur fyri Fólkaflokkin árini 1981-85.

Ingi Mohr stillar ikki uppaftur

Ingi Mohr í Havn stillar ikki uppaftur til b‡rá›svali› 21. november. Hetta hevur ljó›a› líka sí›ani sí›sta val, men tey, i› kenna Inga Mohr væl, høvdu kortini rokna› vi›, at hann var at síggja á onkrum lista tá avtorna›i.

Ingi Mohr var› fyrstu fer› valdur í b‡rá›i› í Havn í 1976 umbo›andi Borgaralistan hjá Peturi í Gong. Borgaralistin var størsti flokkur í b‡rá›num í nógv ár, og Ingi Mohr var fleiri fer›ir størsti atkvø›uslúkur.

Fyri f‡ra árum sí›ani stilla›i Ingi Mohr upp á Fólkaflokslistanum, og var› valdur sum fyrsti ma›ur á listanum vi› gó›um 400 atkvø›um.

Í apríl 1998 førdi innanh‡sis ósemja í Fólkaflokkinum vi› sær, at Ingi Mohr tók seg úr Fólkaflokkinum. Sí›ani hevur hann veri› uttanflokkaumbo› í b‡rá›num í Havn.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysingar@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Krevur skjóta kanning av Serámsdeplinum

Løgtingsma›ur mótmælir játtanini til Sernámsdepilin, tí løgfrø›isliga grundarlagi› undir stovninum er so ivasamt

KANNING
Ey›un Klakstein

Ta› er alney›ugt at fáa ein skjóta kanning av lógargrundarlagnum undir Sernámsdeplinum.

Ta› heldur løgtingsma›urin Finnur Helmsdal, sum undir vi›ger›ini av fíggjarlógini í mentanarnevndini hjá løgtinginum hevur gjørt sína egnu minnilutavi›merking til játtanina hjá Sernámsdeplinum.

– Bæ›i starvsfólk og løgfrø›ingar ivast í, um løgfrø›isliga grundarlagi› undir Sernámsdeplinum eru í lagi, og vit kunnu ikki liva vi›, at ivi er um hetta, tá vit hvørt ár játta næstan 33 milliónir til stovnin, sigur Finnur Helmsdal, sum umbo›ar Tjó›veldisflokkin á tingi.

– Hetta eru løgfrø›ingar, sum vóru vi› til at gera st‡risskipanina, og tí mugu teirra atfinningar takast í álvara, heldur hann.

Eina skjóta ni›urstø›u

Sernámsdepilin var› settur á stovn til fíggjarári› 1998, tá Skúlin á Trø›ni og Sernámsfrø›isliga Rá›gevingin vóru løgd saman til ein n‡ggjan stovn vi› eini felags játtan.

Sí›ani hevur stór ónøgd valda millum starvsfólk á stovninum, og tríggir løgfrø›ingar hava sátt iva um heimildina fyri seta Sernámsdepilin á stovn og at reka hann.

Landsst‡risma›urin í undirvísingar- og mentamálum seg›i t‡sdagin vi› Sosialin, at hann fyrsta dagin fer at seta ein arbei›sbólk at kanna vi›urskiftini á Sernámsdeplinum.

– Um ein kanning skal gerast av øllum økinum, so kann hon lættliga taka eini tvey ár at gera, og ta› er ikki loysnin at júst hesum málinum. Vit mugu hava eina skjóta kanning sum kemur til eina ni›urstø›u um løgfrø›isliga grundarlagi› undir Sernámsdeplinum, sigur Finnur Helmsdal, løgtingsma›ur.

Ney›ugt er vi› eini skjótari kanning av løgrfrø›isliga grundarlagnum undir Sernámsdeplinum
Mynd: Jens Kristian Vang

Álvarsmál

Hann heldur, at ta› er eisini ney›ugt, at løgtingi› slleppur at siga sína hugsan um Sernámsdepilin.

– Samanleggingin av Skúlanum á Trø›ni og Sernámsfrø›isligu Rá›gevingini hevur onganтí› veri› til vi›ger›ar í løgtinginum, og ta› havi eg á›ur víst á. At ta› er ivasamt vi› heimildunum hjá stovninum, meti eg ver›a eitt álvarsligt mál, sum vit nú mugu fáa upp á pláss, sigur Finnur Helmsdal.

Hann sigur, at starvsfólk, løgfrø›ingar og politikarar hava víst á trupulleikarnar í hesum málinum í langa tí›, og at bólturin nú liggur hjá landsst‡rismanninum.

– Hann má fáa grei›i á hesum vi›urskiftunum, og ta› má hann gera sum skjótast. Ta› er bara landsst‡risma›urin, sum nú kann fáa hesi vi›urskifti í rættlag, og eg havi eisini álit á, at hann fer at gera ta› ney›uga í hesum máli, sigur Finnur Helmsdal.

Nor›urlandará›i› hei›rar Mikkelborg

Danski trompet úrmælingurin Palle Mikkelborg fekk í gjár Nor›urlendsku Tónleikavir›islønina. Hetta var› kunngjørt á middegi í gjár. Eisini føroyingur var í uppskoti. Annar føroyingur er samstarvsfelagi og ein av tónleikaligu hornasteinunum hjá ársins vinnara

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

Palle Mikkelborg er gamal kenningur í Føroyum. Hann hevur luttiki› á Jazz, Fólka og Bluesfestivalinum og hann vitjar aftur komandi ár, tá festivalurin hevur heiti› Listahátí› Føroya.

Á middegi í gjár kungjørdi Nor›urlandará›i› í Copenhagen Jazzhouse, at Palle Mikkelborg fær Nor›urlendsku Tónleikavir›islønina.

Í uppskoti til vir›islønina vóru m.o. Ole Kristiansen, Benny Andersson, i› er kendur úr Abba, og føroyingurin Magnus Johannessen. Ta› er felagsskapurin Nomus, Nordisk Musikkomite, i› innstillar til vir›islønina.

Í ár gjørdist vinnarin ein dani. Palle Mikkelborg er føddur í 1941 og er kendur trompetleikari. Hann spælir jazz, men tónleikur hansara er eisini so nógv anna›. Hann er leitandi, improviserandi og hann roynur n‡ggjar lei›ir. Umframt at vera trompetsnillingur, leikar Mikkelborg eisini onnur ljó›føri.

Palle rósar Óla Poulsen

Ein hin kendasti føroyingurin í danska tónleikaheiminum er Óli Poulsen. Føroyingurin, i› tók lei›ina til Danmarkar seinna helming av áttatiárunum og sum gjørdist ein hin dugnaligasti og mest avhildni tónleikaframlei›arin (produsarin) í Danmark. Hann hevur m.a. starvast vi› Michael Learns to Rock, Hanne Boel, Sidsel Kyrkjebø og so sanniliga eisini Mikkelborg.

Palle Mikkelborg hevur ikki dult, at hann er gla›ur fyri samstarvi› vi› Óla, i› hevur framleitt sí›stu útgávurnar hjá Palla Mikkelborg.

Palle Mikkelborg er kosin at fáa árins tónleikavir›isløn frá Nor›urlandará›num. Hann hevur føgur or› at siga um samstarvsfelagan, føroyingin Óla Poulsen

Longu í 1992 finna vit Óla Poulsen á fløguni hjá Mikkelborg, i› nevnist Anything but Grey. Óli hevur framleitt, tiki› upp og hann spælir eisini fleiri ljó›føri. Og ta› eru vøkur or›, i› ársins vinnari hevur at bera Óla á hesi fløguni. Mikkelborg takkar og sigur: to Óli Poulsen for guiding me over the ocean and for showing me the sound of it.

Vir›islønin er áljó›andi 350.000 danskar krónur og vir›islønin ver›ur handa› í Oslo 2. - 3. apríl 2001.

Teir tóku land 5
- føroyingar í Grønlandi

Jógvan Arge hevur givið út eina nýggja bók í røðini "Teir tóku land". Greitt verður frá, tá føroyingar í túsundatali stevndu til Grønlands í 1959. Samstundis legði landsstýrið doyðin á at fáa nýggj rættindi. Tað eydnaðist, men føroyingar noyddust at avreiða til KGH fyri undirprís afturfyri.

Nýggjar útróðrarstøðir vórðu bygdar í Borgshavn, Kangarssuk og norðaru havn í Ravnsoynni, og Nordafar grundaði sítt flakavirki í Føroyingahavnini. Trolarar fóru við bátum til Eysturgrønlands, og stórreiðarin Jógvan Kjølbro í Klaksvík sendi eina heila konvoy av deksbátum hagar við flaggskipinum "Karin K" á odda.



Føroyski skipaflotin undir Grønlandi var størri enn nakrantíð. Millum Nuuk, Tórshavn og Keypmannahavn var álvarsom diplomatiskt ósemja um Eysturgrønland. Politikararnir og fólk vóru á gosi.

299,-

Jógvan Arge